gult cyan magenta svart



# Framkomi› vegastrekki

*Vi› n‡ger›ini av R.C. Effersøesgøtu, SMS vegnum, hevur Havnin fingi› kanska mest framkomna vegastrekki› í landinum*

JÁKUP MØRK

For›ingar eru settar á gongubreytina, so ta› er ney›ugt at snara sær móti fer›sluni, tá komi› er hálva lei›

mynd: Jens Kr. Vang

Stórar broytingar eru hendar á omanfyrinevnda vegastrekki, eftir at b‡rá›i› fyri gó›um hálvum ári sí›ani gjørdi av, at nú skuldi okkurt gerast vi› vegin.

Vegastrekki› taldist tá millum tey vandamestu í landinum, og eisini vóru fer›sluvanlukkur hendar. Serliga vi› gonguteigin út fyri ni›aru innkoyringina til SMS.

### Rundkoyring mátti til

Tí›liga í málsvi›ger›ini var› greitt, at ein rundkoyring skuldi gerast á økinum, men umframt hetta, so eru eisini fleiri a›rir hentleikar vi› vegnum. Hentleikar, ella snildir, sum allar hava til endamáls at gera teinin tryggari at fer›ast á.

Bogi Haraldsen, b‡arverkfrø›ingur, grei›ir frá, at a›almáli› vi› n‡ger›ini var at fáa fer›ina á fer›sluni ni›ur. Frammanundan høvdu fer›slumátingar hjá b‡rá›num s‡nt, at ta› koyrdu omanfyri 11.000 bilar um samdøgri› eftir vegnum, og fer›in á hesum var ikki lítil. Eitt nú nevnir hann, at smb. mátingunum, koyrdu bilar vi› upp til 130 km/t, me›an mátingarnar vór›u gjørdar.

Rundkoyringin sjálv er ein li›ur í royndunum at fáa fer›ina ni›ur, tí bilar fáa sjálvsagt ikki koyrt eins skjótt eftir vegnum, tá ein rundkoyring er á vegnum.

Harumframt er vegastrekki eisini smalka›, umframt at ein snaring er millum bá›ar innkoyringar til SMS, sum eisini er vi›virkandi til, at fer›in gerst lægri.

Í sambandi vi› rundkoyringina nevnir Bogi annars, at enn er arbei›i› vi› hesi ikki heilt li›ugt. Ætlandi skal sjálv rundkoyringin hækkast, solei›is at hon liggur hægri enn sjálvur vegurin, fyri á henda hátt at fáa bilarnar at seta fer›ina enn meira ni›ur.

### Eisini tryggari at ganga

Umframt at fáa fer›ina ni›ur, eru gonguteigarnir eisini gjørdir tryggari. Onkur hevur annars funnist at, at høgar steinsetingar eru, tá komi› er í helvt á gonguteiginum, men eisini hetta er vi› beráddum huga.

Hugskoti› vi› hesum er nevniliga, at ta› bert skal fer›ast um eina vegsí›u í senn. Harumframt ver›a gongufólk noydd at snara sær móti fer›sluni, tá komi› er út millum koyribreytirnar, solei›is at síggjast kann, um nakar bilur er á veg.

Umframt gongufólki›, er eisini hugsa› um súkklufólki›, tí hesi hava nú eisini fingi› eina breyt at súkkla á. Hvørt hetta ver›ur vanlig si›venja í framtí›ini, dugdi Bogi Haraldsen ikki at siga, men hann seg›i ta› tó vera væl hugsandi, at hetta ver›ur gjørt á ávísum strekkjum.

### Skal ver›a roksut

Umframt sjálvt a›almáli›, er ætlanin hjá b‡rá›num eisini, at ein størri partur av fer›sluni, og serliga tungu fer›sluni, skal beinast yvir á Ringvegin. Enn er hesin ikki heilt li›ugur, men væntandi kann koyrast eftir Marknagilsvegnum aftur einafer› í heyst ella vetur.

Ta› kann kanska tykjast irriterandi hjá bilførarum og ø›rum, at so nógvar for›ingar eru á SMS vegnum, men hesum hevur Bogi einki ímóti: Eru ta› bilførarar, sum ikki tíma at koyra eftir vegastrekkinum, og heldur velja Ringvegin, so er okkara endamál rokki›, heldur hann fyri.

Hann heldur ta› tó enn vera ov tí›liga at meta um, hvørt ætlanin er væleydna› ella ikki. Spurdur, um heldur hetta vera mest framkomna vegastrekki í landinum, svarar Bogi, at ta› torir hann einki at siga um. Hann sigur seg tó vóna, at vegastrekki nú ver›ur tryggari, og í øllum førum hava tey roynt at gera ta› so trygt sum gjørligt.

Enn fyriliggja ikki n‡ggjar fer›slumátingar fyri vegastrekki›, men tá hesar ver›a gjørdar, ber helst til at gera eina neyvari eftirmeting av arbei›inum.

# Økt teleútbo›

*Ikki fyllur ta› nógv, teletí›arkorti›, men møguleikarnir eru nógvir*

Mynd: Jens Kr. Vang

*Frá mánadegnum at rokna, er møguleiki at keypa sær avmarka›a talutí› til GSM telefonir*

JÁKUP MØRK

Skipanin vi› talutí›arkortum hevur longu veri› virkin í Danmark eina tí›, og nú fáa føroyingar so eisini møguleikan at n‡ta hesa skipan. Í Føroyum er tó sett e fyri a, solei›is at skipanin her eitur Teletí›.

### Rinda frammanundan

Í stuttum er talan um eina skipan, har tú vi› at keypa eitt talutí›arkort, SIM-kort, sum so at siga er lykilin til fartelefonina.

Tá tú keypir sjálvt korti›, rindar tú samstundis fyri ein byrjunarpakka, solei›is at kostna›urin í alt er 300 kr., harav 100 kr. eru fyri talutí›.

Hvørja fer› tosa› ver›ur, ver›ur kostna›urin fyri samrø›urnar so drigin frá saldoini. Sjálvsagt er eisini møguleiki at seta pening inn, solei›is at saldoin aftur økist. Hetta ver›ur gjørt vi› at keypa teletí›arkort, sum fáast til keyps í sølustø›um kring landi›.

Um saldoin er tóm, kann telefonin tó kortini n‡tast í upp til 6 róna›ir eftir, at peningur er settur inn. Tó er talan tá bert um inngangandi samrø›ur.

### Fleiri fyrimunir

Í tí›indaskrivi, sum Føroya Tele hevur sent út í hesum sambandi, ver›a nevndir ein rúgva av fyrimunum, umframt at allar tær vanligu GSM tænasturnar eisini eru tøkar í skipanini.

Millum anna› ver›ur sagt, at vi› hesum slepst undan at rinda naka› mána›argjald, ongar rokningar ver›a sendar, eins og brúkarin alí› kann síggja, hvussu nógv vi›komandi hevur tosa› fyri. Eisini ver›ur nevnt, at eingin treyt er um, at kundin skal ver›a fyltur 18 ár. Um hetta er ein fyrimunur, má so vera upp til tann einstaka at meta um.

### Tvífalda›ur prísur

Sjálvsagt er ikki bara talan um fyrimunir vi› skipanini. Alt hevur jú sína baksí›u, og í hesum førum er ta› kostna›ur fyri n‡tsluna.

Tá tosa› ver›ur úr telefon, sum n‡tir teletí›artænastuna, er kostna›urin í vanligari tí› 5 kr. um minuttin og helvtina av hesum í bíligu tí›ini.

Vi› vanligum GSM-haldi er talan um 2,40 oyru og helmingin av hesum, so ta› er allarhelst á hesum øki, at Føroya Tele ætlar sær at vinna pening vi› n‡ggju skipanini.